PRIX

1. innleiðandi umfar – Mentanarhúsið í Fuglafirði – leygarkvøldið 25. januar kl. 21.00

## Søren Søgaard

**Søren Søgaard – sang og gittar**

Danski gittarspælarin kom í summar til Føroya at búgva. Hann hevur áður búð í Føroyum og í nítiárunum ferðaðist hann javnan hendan vegin úr Danmark at spæla saman við Bergmonnum.

36 ára gamli Søren Søgaard spælir gittar og syngur, og tað hevur hann gjørt síðani ungdómstíðina. Hann læs religión og týskt á universitetinum í Århus, og tá plagdi hann at spæla nógv tónleik við síðuna av.



Síðani Søren Søgaard kom til Føroya at búgva aftur, hevur hann bæði spælt á konsertum og givið fløgu út. Hann skrivar sjálvur tónleikin hjá sær, sum lutvíst er blues-tónleikur.

## S.C.A.T.G.O.H.

**Heri Trondesen – sang**
**Rúni B. Larsen – trummur**
**Regin Skarðhamar – gittar**
**Jógvan Hansen – bass**

Sixth Commandment At The Gates of Heaven gongur undir styttingini S.C.A.T.G.O.H.

Bólkurin er mannaður við lutvíst ungum tónleikarum, sum hava spælt saman í nøkur ár. Tríggir av tónleikarunum hava áður verið við í Prix Føroyum, tað var fyri tveimum árum síðani.



Teir spæla rocktónleik, bæði tungan punkmerktan tónleik og friðarligari rock.

S.C.A.T.G.O.H. er ein av bólkunum, sum venur á Margarinfabrikkini í Havn. Teir hava ikki spælt nógv alment, men nú fáa teir ein møguleika til tað.

## MC Hár

**Niels Uni Dam – rapp**
**Allan Mortensen – rapp**
**Eyðun Ásason Jacobsen – sang**
**Rókur Jakobsen – sang**
**Jónas Bloch Danielsen – gittar**
**Jens Virgar Jakobsen – gittar og sang**
**Rani Christiansen – trummur**
**Heri Reynheim – bass**
**Brynjolfur á Heygum – ljómborð**
**Harumframt eini 2-3 hjálparfólk**



Hetta er onnur ferðin, at MC-Hár er við til Prix Føroyar. Fyrstu ferð var í 1999, tá ið bólkurin spældi seg til eitt 3. pláss í finaluni.

Allir í bólkinum gleða seg nógv og eru í skrivandi stund á venjingarlegu. Stílurin er enn tann sami, ið hevur sermerkt bólkin, síðani hann byrjaði at spæla.

MC-Hár elskar framvegis teg, og fer at oysa av sínum kærleika til fyrsta umfari tann 25. januar.

## Human Chaos

**Gulli Johansen – gittar og sang.**
**Forritan, ljómborð og bass spælt inn á fløgu.**
**Unn Thomasen – Design og styling.**

Human Chaos hevur verið til síðani Prix Føroyar 2001, tá ið Gulli gjørdi av at broyta navn frá Internal Healing, sum hann fór at spæla undir í 1995 og sum hann eisini kallaðist í Prix Føroyum í 1999, til Human Chaos. Hetta komst av, at hann ikki longur spældi kristnan tónleik.



Human Chaos hevur spælt nógv síðani síðstu Prix Føroyar kappingina, serliga til Free Føroyar tiltøk.

Human Chaos gav eisini eina fløgu út í 2001, hendan kallaðist Self Destruct. Nú arbeiðir Gulli við næstu útgávuni.

## Headache Blues Treo

**Uni R. Debess – sang og gittar**
**Búi Dam – gittar**
**Edvard Nyholm Debess – bass og sang**
**Rógvi á Rógvu – trummur**

Headache Blues Treo hevur umleið 4 mánaðar á baki og hevur spælt á ymsum støðum í Havn. Stigtakari til bólkin er Uni R. Debess, og afturat sær hevur hann royndar tónleikarar.



Stílurin er blues, men Headache Blues Treo hevur sín heilt egna blues-stíl, ið er nógv merktur av teimum einstøku tónleikarunum í bólkinum.

Vanliga spælir bólkurin eina blanding av egnum løgum og løgum hjá til dømis Doors, Jimi Hendrix og øðrum. Men til Prix Føroyar fer bólkurin bert at spæla egið tilfar.

## Flux

**Hans Marius Weihe Ziska – sang og gittar**
**Kristian í Vági – bass**
**Sveinur Gaard Olsen – trummur**

Flux hevur ikki gjørt so nógv um seg síðani seinasta Prixið, men teir hava tó javnan verið úti og spælt. Broytingar hava verið í manningini í bólkinum, sum nú spælir sum ein trio. Teir spæla rocktónleik.



Flux hevur verið við í Prixnum seinastu tvær ferðirnar, og teir hava báðu ferðirnar spælt seg í finaluna.

Nú skulu teir royna at skora eitt Prix-hattrick.



# Restorff´s meldaði okkum

**Tað sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, nú bryggjaríið skal møta í rættinum mánadagin fyri brot á løgtingslóg nummar 20 um sølu av rúsandi løgum**

RÆTTARMÁL
*Solby A. Eliasen*



*Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, sigur, at Restorff´s meldaði Føroya Bjór á sinni. Mánadagin skal stjórin møta í rættinum*

**Klaksvík:**
Einar Waag er sannførdur um, at um ikki Restorff´s bryggjarí setti seg í samband við fútan og vístu á lýsingarnar hjá Føroya Bjór í Dimmalætting í mars og apríl í 2002, so var onki sakarmál í dag.

– Restorff´s bryggjarí sendi eitt bræv til fútan, har víst varð á okkara lýsingar og spurt, um tær vóru lógligar. Og tað taki eg sum, at tað er Restorff´s, sum hevur meldað okkum, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór. Føroya Bjór er ákært fyri brot á løgtingslóg nummar 20 um sølu av rúsandi løgum.

Í ákæruritinum hjá Føroya Bjór stendur, at Føroya Bjór breyt lógina, tá tey høvdu lýsingar á baksíðuni av Dimmalætting. Í lýsingunum, sum vóru matuppskriftir, har øl varð nýtt í uppskriftunum og afturvið, vóru myndir av sterkum øli.

Tað er í stríð við løgtingslóg nummar 20, og tí skil stevndi fútin Føroya Bjór, sum skal møta í rættinum mánadagin 27. januar.

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, undrast á framferðarháttin hjá fútanum í hesum málinum. Hann sigur, at tá Restorff´s á sinni fekk bót fyri teirra brot á somu lóg, tá hoyrdi hann í Útvarpi Føroya, at fútin hevði gjørt av at sleppa sakarmálinum móti Føroya Bjór og heldur geva teimum eina bót líknandi henni, sum Restorff´s fekk.

– Tað fingu vit ongantíð skrivligt boð um frá fútanum, eg hoyrdi tað einans í útvarpinum. Men tvær vikur seinni fingu vit kortini eitt ákærurit sendandi og boð um at møta í rættinum tann 15. januar. Henda dagfesting bleiv so seinni broytt til nú mánadagin, greiðir Einar Waag frá. Hann undrast stórliga á, at fútin á sinni valdi at úttala seg til fjølmiðlarnar, áðrenn hann vendi sær til bryggjaríið.

Júst hvat útspælið frá bryggjarínum verður í rættinum mánadagin, sigur Einar, at tað hava bryggjaríið og sakførari teirra ikki endaliga avgjørt enn.

# Handils- og vinnutelefonbók fyri Norðoyggjar

**Norðoya Kunningarstova og hondbóltsfelagið Stjørnan eru farin undir eina áhugaverda verkætlan, sum hevur til endamáls at gera tað lættari hjá norðoyingum at kunna seta seg í samband við virkir og handlar**

TELEFONBÓK
*Solby A. Eliasen*



*Einaferð í vár kemur ein handils- og vinnutelefonbók út í Norðoyggjum. Tað er Norðoya Kunningarstova og hondbóltsfelagið Stjørnan, sum standa fyri verkætlanini*

Talan er um ein handils- og vinnutelefonbók, sum Norðoya Kunningarstova saman við Stjørnuni hevur arbeitt við í longri tíð. Hetta er fyrstu ferð, at ein tílík telefonbók kemur út í Norðoyggjum, og verður hon óivað eitt hent amboð, tá ringjast skal til handlar og virkir í Norðoyggjum. Nýggja telefonbókin verður væntandi á gøtuni í vár.

Christian Olsen, leiðari á Kunningarstovuni sigur, at handlar og virkir hava tikið sera væl ímóti hesum tiltaki og er áhugin stórur at verða við í Norðoya handils- og vinnutelefonbók 2003.

Men hann leggur eisini afturat, at um hetta tiltak skal eydnast til fulnar, so er neyðugt at øll virkir og handlar í Norðoyggjum vilja verða við.

Formaðurin í Klaksvíkar Handilsfelag, Jógvan Jacobsen, heldur, at hetta er sera áhugavert, og at tað fer at lætta um hjá viðskiftafólkunum í Norðoyggjum at seta seg í samband við handlar og virkir.

Kundarnir í telefonbókini verða skipaðir eftir alfabetiskum raði og eftir vinnugreining. Eisini er ætlanin, at stovnar í Norðoyggjum skulu verða við í nýggju telefonbókini.

Tað verður felagið Vasti, sum kemur at standa fyri uppsetan og klárgerðan av telefonbókini. Teir handlar og tey vinnuvirki, ið ikki hava fingið skriv frá Kunningarstovuni og ætla at verða við, kunnu boða Kunningarstovuni frá á tlf 456939 ella á teldupost info@klaksvik.fo